SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Dagfesting: 09-06-2023

# UPPSLAG

## Burturbeining av burturkasti frá skipum

Sambært kunngerð nr. 122 frá 25. november 2005 og kapittul XXV í Fráboðan frá Sjóvinnustýrinum B, D, E og F og sambært Fylgisskjal V til altjóða MARPOL sáttmálan

Burturkast skal skiljast sambært niðanfyri nevndari talvu og skal goymast í íløtum umborð.

Alt burturkast skal sum neyðugt hendast til móttøkuskipan á landi

Tað sum er loyvt at blaka út, má einast gerast sambært talvuni niðanfyri og við loyvi frá skipara.

| Slag av burturkasti | Føroyskt sjóumveldi (12 fjórðingar) | Uttan fyri føroyskt sjóumveldi | Serlig havøki[i] |
|---|---|---|---|
| ***Alt tilfar úr plasti*** t.d. togverk, nylon, net og annar fiskireiðskapur og plastposar | Bannað | Bannað | Bannað |
| ***Lutir, ið flóta*** t.d. dunnage, fóðrings- og pakkitilfar | Bannað | Meira enn 25 fjórðingar úr grund-linjuni | Bannað |
| ***Annað burturkast*** t.d. pappír, klædnatilfar, glas metal, fløskur og tílíkt | Bannað, tó loyvt meira enn 3 fj. úr grundlinjuni, um burturkastið er malið og gongur gjøgnum eitt sáld við eini meskavídd, uppá maks 25 mm | Meira enn 12 fjórðingar úr grund-linjuni | Bannað |
| ***Matburturkast*** | Skip undir 400 BT: 1 fjórðing úr landi<br><br>Skip 400 BT og størri: 3 fjórðingar úr landi um burturkastið er malið og gongur gjøgnum eitt sáld við eini meskavídd, uppá maks 25 mm | 12 fjórðingar úr nærmasta landi | 12 fjórðingar úr nærmasta landi |

[i] Serlig havøki er t.d. Norðsjógvurin, Eingilska Kanalin, Eystursjógvurin, Miðjarðarhavið v.fl. sum nærri ásett í grein 5 í kapittul XXIV í Fráboðan frá Skipaeftirlitinum B, D, E og F.